*Pressutalsmaðurin hjá BP:*

# Boringin við markið sera væleydnað



Tað hevur gingið so væl í hond hjá bretska oljufelagnum BP við borgunum í blokki 204, stutt frá føroyska markinum, at teir hava bert brúkt umleið helvtina av ætlaðu tíðina til boringarnar.

Pressutalsmaðurin hjá BP í Aberdeen sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at teir góvu við boringunum fyri 10 døgum síðani. Annars var mett at tað fór at taka einar tríggjar mánaðir at bora í 204 og at teir fóru at vera liðnir til jóla.

Talsmaðurin hjá BP sigur, at boringin gekk nógv betur enn teir høvdu roknað við. Teir høvdu ongar trupulleikar í hesi boringini, men BP vil einki siga um, hvat er komið burtur úr.

BP upplýsir, at talan er um eitt "tight hole", og teir upplýsa ikki um úrslit av eini slíkari boring. Teir avgera sjálvir nær teir siga nakað um úrslitini, og tað kann væl henda, at teir als ikki fara at siga nakað.

**-Men hvussu søgdu tit so frá, at tit høvdu funnið olju í blokki 204 stutt eftir fundið?**

-Tað er okkara egna val. Vit halda ikki, at vit hava nakra grund til at siga hví. Vit avgera slíkt heilt einsamallir og eisini nær.

BP hevur staðið fyri sera umfevnandi seismiskum kanningum í økinum millum Føroyar og Bretland og í løtuni verða upplýsingarnir viðgjørdir av granskararum hjá BP.

BP hevur higartil borað trý hol í øki 204. Tvey í fjør í 204/24A. Seinasta borholið er í 204/20. Í øllum økinum vestan fyri Hetland hava teir borað eini 60 hol.

Talsmaðurin hjá BP vil annars einki upplýsa um útlitini fyri at finna olju. Hann sigur, at teir hava borað á 270 metra dýpi. Boripallurin Ocean Valiant arbeiðir nú í Norðsjónum, men ætlanin er at fara undir nýggjar boringar í næsta ár.

BP upplýsir, at tað í økinum finst eitt potentiali fyri olju, og tað er tí teir halda fram við kanningunum komandi ár. Fundið teir gjørdu í fjør er upp á millum 250.000 og 500.000 tunnur av góðari olju.

BP sigur at enda, at teir eru sera væl nøgdir við arbeiðið sum er gjørt í blokki 204 og øllum økinum har nærhendis. Upprunaliga varð hetta mett at taka tvey ár, men so væl hevur gingið í gongd og so væl hevur arbeiðið verið lagt til rættis, at tað fer bert at taka eitt ár.

jan





## EYSTUROYINGAR HYGGIÐ HER!

Nú kann

KLAKSVÍKAR DAMPVASKARI & REINSARÍ

bjóða tygum eina betri tænastu.

Tit skulu bert lata toy.ð inn hjá

**JOSI Skála ella JUNGMANN Runav.**

Umframt at vaska alt vanl. toy, dúkar (sum vit eisini stíva) og annað, reinsa vit alt so sum klæðningar – konufólka- & mannfólkabúnar – knarvakot – dýnujakkar – gardinur og eisini við góðum úrsliti oljudálkaðar ketil- og termodraktir o. a. m.

Sjálvsagt vaska reinsa vit eisini dýnur og koddar.

Veitsludúkar kunnu tit eisini leiga hjá okkum.




*Altíð fyrsta floks*
*Skjót & góð avgreiðsla!*

Nyggivegur 26, 700 Klaksvík Tlf. 55160



## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**torsdag den 09. dec. 1993 kl. 14.00**

tvangsauktion, (AS 586/93) over matr. nr. 56 ch, Argir, beliggende Traðargøta 43, Argir.

Auktionen er begæret af likvidator Eyðfinn Jacobsen, Bøkjarabrekka 9, Tórshavn, tlf. 1.9526 (j. nr. 193120) på vegne likvidationsboet.

Ejendommen er en erhvervsbygning på en 982 kvm. stor grund i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,** den 16.11.93
Mette Søgaard-Nielsen
dfm

## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**torsdag den 09. dec. 1993 kl. 13.20**

tvangsauktion, (AS 467/93) over matr. nr. 970 c og 970 d, Tórshavn, bygning på lejet grund beliggende Vestara bryggja, Tórshavn.

Auktionen er begæret af advokat Páll Nielsen, Hoyviksvegur 27, Tórshavn, tlf. 1.2171 (j. nr. 6487.001) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er en filetfabrik.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,** den 16.11.93
Mette Søgaard-Nielsen
dfm

## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**torsdag den 09. dec. 1993 kl. 11.50**

tvangsauktion, (AS 472/93) over matr. nr. 309, Tórshavn, beliggende Sverris gøta 19, Tórshavn.

Auktionen er begæret af likvidator Annfinn Hansen, Niels Finsensgøta, Tórshavn, tlf. 1.0193 (j. nr. 313/92) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er en handelsbygning på en 122 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 69,4 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,** den 16.11.93
Mette Søgaard-Nielsen
dfm